# Í dunnuhylinum




Stýrisskipanarlógin – halgilutur fullveldisins – skal ikki dálkast av neyðsemjum



## TF høvuðsstuðul hjá Helga Dam Ziska

Tryggingarfelagið Føroyar hevur gjørt stuðulsavtalu við føroyska telvaran Helga Dam Ziska, ið hevur fingið sera góð úrslit bæði í Føroyum og uttanlanda seinastu árini.

Helgi Dam Ziska, telvari, og Kristina Háfoss, deildarstjóri hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, undirskrivaðu sáttmálan.

Helgi Dam Ziska sigur, “Eg eri sera fegin um stuðulin, sum ger tað lættari hjá mær at taka lut í kappingum uttanlanda og menna meg sum telvara.”

Í ár hevur Helgi Dam Ziska fingið sera góð úrslit. Helgi Dam Ziska hevur vunnið finaluna í føroysku Grand Prix-kappingini í talvi. Hann vann kappingina við 8½ stigi av 9 møguligum, ½ stig framman fyri nærmasta avbjóðara. Við sigrinum gjørdist Helgi eisini samlaður Grand Prix-vinnari 2010/11 við tilsamans 35 Grand Prix stigum - ella tað sum svarar til 100% úrtøku.

Eisini hevur Helgi Dam Ziska vunnið FM í talvi fyri einstaklingar í 2011.

Kristina Háfoss, deildarstjóri í Tryggingarfelagnum Føroyum sigur, “Vit vilja vera við til at menna føroyska telving, og gleðast tí um, at vit kunnu stuðla undir menningini hjá Helga. Okkara samstarv við Helga fer at geva honum betur møguleikar at menna seg og at skapa úrslit, bæði í Føroyum og uttanlanda. Úrslit, ið kunnu gera at hann røkkur sínum máli, ið er, at gerast altjóða stórmeistari í telving.”

Tá umrøður altjóða úrslit í ár, so hevur Helgi í vár kappast í Íslandi, har hann gjørdist nr. 31 av 150 telvarum, og hevur hann eisini verið til EM fyri einstaklingar í Fraklandi, har hann gjørdist nr. 86 av 393 telvarum.

Næsta avbjóðingin hjá Helga Dam Ziska verður EM fyri smátjóðir, sum verður í Klaksvík í august mánaða í 2011.

## Í MORGIN

7/10 °C



4-9 m/s | 2-7 m/s

Lot til andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin upp í stívt andøvsgul. Sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 7 og 10 stig.

## SUNNUDAGIN

6/9 °C



5-10 m/s | 5-10 m/s

Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin milum 6 og 9 stig.

## MÁNADAGIN

5/8 °C



8-13 m/s | 3-8 m/s

Lot til andøvsgul av ymsum ættum, seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk av norði. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Týsdagin upp í stívt andøvsgul av útnyrðingi, mikudagin lot av ymsum ættum. Sólglottar, men eisini ælingur og hitin millum 4 og 8 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 1005 hPa. sunnan fyri Føroyar fer eystureftir.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið við Hetland fer norðureftir og lágtrýstið við Ísland stendur mestsum í stað.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 70 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | -9 | Tromsø | -1 | Moskva | -13 | Athen | 14 |
| Reykjavík | 8 | Bergen | -2 | Berlin | -6 | Beijing | 11 |
| Tórshavn | 7 | Oslo | -9 | Paris | 3 | New Dehli | 20 |
| Lerwick | 4 | Stokkhólm | -6 | Madrid | 15 | Bangkok | 32 |
| Aberdeen | 7 | Keypmannah. | -4 | Róm | 11 | Sydney | -- |
| London | 8 | Helsinki | -19 | Malorca | 15 | New York | 2 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

10. mai — Fyrra kvarter
15. mai — Mánin næstur jørðini
17. mai — Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13. mai | 03:37 | 16:00 | 02:37 | 15:00 | 02:52 | 15:15 | 05:37 | 18:00 | 06:37 | 19:00 | 01:52 | 14:15 | 00:52 | 13:15 | 03:52 | 16:15 | 04:52 | 17:15 | 03:22 | 15:45 | 04:37 | 17:00 |
| 14. mai | 04:23 | 16:47 | 03:23 | 15:47 | 03:38 | 16:02 | 06:23 | 18:47 | 07:23 | 19:47 | 02:38 | 15:02 | 01:38 | 14:02 | 04:38 | 17:02 | 05:38 | 18:02 | 04:08 | 16:32 | 05:23 | 17:47 |
| 15. mai | 05:12 | 17:37 | 04:12 | 16:37 | 04:27 | 16:52 | 07:12 | 19:37 | 08:12 | 20:37 | 03:27 | 15:52 | 02:27 | 14:52 | 05:27 | 17:52 | 06:27 | 18:52 | 04:57 | 17:22 | 06:12 | 18:37 |
| 16. mai | 06:03 | 18:33 | 05:03 | 17:33 | 05:18 | 17:48 | 08:03 | 20:33 | 09:03 | 21:33 | 04:18 | 16:48 | 03:18 | 15:48 | 06:18 | 18:48 | 07:18 | 19:48 | 05:48 | 18:18 | 07:03 | 19:33 |
| 17. mai | 06:58 | 19:27 | 05:58 | 18:27 | 06:13 | 18:42 | 08:58 | 21:27 | 09:58 | 22:27 | 05:13 | 17:42 | 04:13 | 16:42 | 07:13 | 19:42 | 08:13 | 20:42 | 06:43 | 19:12 | 07:58 | 20:27 |